# Breið grundvitan í psykiatri

**Herfyri vóru um hálvthundrað fólk samlað á Landssjúkrahúsinum til eitt grundskeið í psykiatri, sum Psykiatriski Depilin skipaði fyri.**

**Luttakarar vóru fakfólk, sum á ymsum økjum arbeiða við fólki, ið hava sálarligar trupulleikar**

PSYKIATRI
*Snorri Brend*



*Tey høvdu bert væntað 50, men tá avtornaði boðaðu 100 fólk frá luttøku til skeiðið. Her síggjast tveir teirra*

**Havn:** Psykiatriski depilin arbeiðir við ymiskum tiltøkum fyri at menna fakligu vitanina hjá starvsfólkunum.

Eitt av hesum tiltøkum er at skipa fyri grundskeiðum og eftirútbúgvingum í psykiatri.

Líknandi grundskeið hevur verið hildið áður, men var tað tá við útlendskum fyrilestrarhaldarum. Hesaferð vóru allir undirvísararnir fólk ið starvast á psykiatriska deplinum.

Skeiðið vardi alla vikuna og skráin var fjølbroytt og umfatandi. Endamálið var at geva luttakarunum eina breiða grundvitan, og samstundis at virka sum ástøðiligt “brush-up” fyri tey, sum hava arbeitt innan fakið eina tíð.

Áhugin fyri at luttaka á skeiðnum var rættuliga stórur.

- Vit høvdu væntað eini 40-50 luttakarar, men tá tilmeldingarfreistin var úti, høvdu um 100 fólk meldað seg til, siga fyrireikararnir.

Avgjørt var tí at skipa fyri tveimum grundskeiðum, har tað fyrra hevur verið og seinna skeiðið av sama slagi verður hildið um miðjan juni.

**Høvuðsevnini á skeiðnum vóru hesi:**

- psykiatrisk hugsan og viðgerð í søguligum ljósi
- lívfrøðiligir, sálarfrøðiligir og sosialpsykiatriskir viðgerðarhættir
- diagnosteringsskipanir við høvuðsdenti á ICD-10
- psykotisk eyðkenni
- skizofreni
- persónsmenskutrupulleikar
- affektivir trupulleikar
- nervaveikindi, OCD, angist
- psykiatrisk rehabilitering
- dupultdiagnosur
- børn og ung við psykiatriskum trupulleikum




VILT TÚ VERÐA **NÆMINGUR** HJÁ OKKUM?

Tak eina avbjóðandi og fjølbroytta útbúgving í Tryggingarfelagnum Føroyum. Vit leita eftir hugagóðum og dugnaligum næmingum, sum tora at taka ábyrgd og vilja hava ávirkan.

Vit sóknast eftir næmingum, ið tora at ganga á odda og eru fúsir at vera partur av eini fyritøku, sum í fullari ferð stevnir ímóti avbjóðingum á altjóða støði. Tryggingarfelagið Føroyar er nýhugsandi, framsøkið og høgt í metum. Hevur tú árræði, kanst tú vera við til at mynda felagið.

Fíggjarútbúgvingin er ein tvey ára útbúgving, sum fevnir um ein praktiskan og ein teoretiskan part. Fíggjarútbúgvingin gevur tær góðar starvsmøguleikar innan tryggingar- og bankaverðina. Sum næmingur í Tryggingarfelagnum Føroyum fært tú ein hollan kunnleika um tryggingar og lærir millum annað um løgfrøðina aftanfyri. Tú arbeiðir eitt skifti í senn á ymiskum tryggingarøkjum, og soleiðis fært tú innlit í fjøltáttaða arbeiðið í eini stórari fyritøku við 120 starvsfólkum.

Tú fært teoretiskan førleika gjøgnum undirvísing og uppgávur, sum skulu gerast við jøvnum millumbilum. Útbúgvingin gevur tær góðar møguleikar fyri framhaldandi tryggingarútbúgving til eitt nú tryggingarráðgeva ella skaðaviðgera. Næmingatíðin mennir teg og tínar førleikar og er eitt avgerandi stig á tíni yrkisleið. Tú verður ein partur av einum toymi við sera dugnaligum starvsfeløgum og fært møguleika at ávirka og seta dám á tína deild.

Á www.trygging.fo kanst tú lesa meira um Tryggingarfelagið Føroyar og okkara virksemi. Vilt tú vita meira, ert tú eisini vælkomin at ringja til Starvsfólkadeildina á tel 345600 ella skriva til starvsfolkadeild@trygging.fo

Tað er ein treyt, at tú hevur studentsprógv, HF, HH ella líknandi. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. juni 2007. Avrit av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella fyllast út á www.trygging.fo

sansir.fo

Tryggingarfelagið Føroyar P/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn og 5 deildir kring landið. Í felagnum starvast 120 fólk.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari